VIÐMERKINGAR

# Eingin náttúrlóg er, ið sigur at fólkatingslimur skal veljast úr einum av stóru flokkunum

**Jenis av Rana**



VAL05

Nógv óføroyskt er, sum millum ár og dag kemur inn á okkum uttanífrá, og roynir at má støðið undan tí kristna grundarstøði, land okkara byggir á. Náttúrligt, vegna aldragamla sambandið tjóðanna millum, koma høvuðsárinini umvegis Danmark, og heilt náttúrligt er tí at royna at venda streyminum og fáa tað góða, sum tjóð okkara hvílir á, út til hesa og aðrar tjóðir. Her er fólkatingsvalið ein veruligur møguleiki, tí júst her hava vit, via tað umboð, ið verður valt at umboða okkum í Danmark og á Fólkatingi, ein møguleika at senda ein greiðan boðskap út, sum kann vera við til at byggja upp, og kanska eisini virka sum ein forðan móti tí, ið annars kemur á okkum.

Miðflokkurin hevur eina greiða hugsjón á økjum, har fleiri av grannatjóðunum tørva slíka. Eg hugsi um økir sum tað etiska, moralska, listarliga og átrúnaðarliga. Boðskapur floksins var nýbrot her á landi fyri fáum árum síðani, skapti kjak og dróg sjónarmið fram, sum í áravís høvdu verið tagd burtur. Men so við og við hevur hann fest røtur, og sett varðandi spor á samfelagið.

Ein av stóru flokkunum vísir á, at hann hava havt fólkatingslim í sjeyti ár- alt gott um tað. Men uttan at taka støðu til virði í umboðan teirra kann sigast, at júst tí hevði kanska verið skilagott at umhugsa at valt ørðvísi hesaferð, at roynt onkran annan.

Annars eru vit fult samdir við teimum sum føra fram, at okkum tørvar ikki flokkar á Fólkating, sum kritikleyst finnast at dønum og donskum politikki, ella flokkar hvørs einasta endamál er at tosa samband ella loysing. Hugsjónir teirra, sum fáa hetta frálíka høvið, at tosa viðurskifti føroyinga á danatingi, má verða djúpri fest og meira vídsýnt.

Tí er Miðflokkurin eitt veruligt alternativ hjá tær at hugsa um á fólkatingsvalinum 8. februar.

# Fimmarin

**Lisbeth L. Petersen**
*fólkatingslimur*



*Í seinastu viku hevði eg høvi at hoyra útvarpssendingina, ið m.a. snúði seg um fólkatingsarbeiðið, har viðmerkingar vóru frá ymiskum sokallaðum "serfrøðingum".*

Eg hevði hug at gera nakrar viðmerkingar, men fekk ikki høvi til tess, so her skal eg bara taka okkurt dømi.

Tá skrivarin í Norðuratlantsbólkinum, sum ein teirra, sera avgjørdur kom við pástandum, ið onki hald var í, krevur tað eitt aftursvar.

Úttalilsið um at sambandsumboðið longu hevur "selt" seg til Anders Fogh Rasmussen, er tikið burtur úr leysari luft. Tað sama kann sigast um pástandin, at sama umboð hevur bundið seg at atkvøða fyri øllum, sum danski flokkurin Venstre kemur og fer at koma við!

At skrivarin segði seg hava verið á fólkatingi í 3 ár, er væl rætt, men tað er hann so ikki einsamallur um, og víðvíkjandi samstarvi millum Sambandsflokkin og Venstre skuldi eg sum fólkatingslimur helst vitað betur enn hann. Eg kann fortelja honum, at eg, eins og okkara flokkur herheima, havi samstarvað við Venstre, men eri ikki limur í danska flokkinum. Eg havi verið limur í tingbólkinum hjá Venstre, og tað er ikki tað sama.

Sama samstarv ætlar nýggi formaður Sambandsfloksins at halda fram við.

Fyri mín part kann eg siga, at samstarvið hesi árini hevur verið sera gott, **eisini** tá eg í ávísum føri havi boðað frá, at eg havi eina aðra støðu enn teir. Tað hevur als ikki verið nakar trupulleiki, og sjálvandi havi eg greitt teimum frá hví.

At vera limur í tingbólkinum hjá størsta danska flokki, ið m.a. telur fleiri ráðharrar, er ein stórur fyrimunur. Tingbólkafundirnir geva eina holla vitan og innlit í nøgv mál, og møguleikarnir at fáa ávirkan eru góðir, tí tú hevur góðar møguleikar beinleiðis at koma á tal við fólk við politiskari ávirkan. Fleiri teirra hava verið hollir stuðlar at heita á, tá ymiskir spurningar hava tikið seg upp.

Tað eru ikki rópini ella tað at dyrka konfrontatiónir, ið byggja nakað upp, tvørturímóti!!

# Føroyar ella "Kongeriget Danmark for såvidt angår Færøerne" ?

**Kristina Háfoss**



VAL05

*Kjakið um uttanríkispolitisku heimildir Føroya tók seg upp undir undanfarnu fullveldissamgongu. Nú hevur kjakið so tikið seg uppaftur, og niðurstøðan er heilt greitt, at neyðugt ikki er við fleiri lógum á økinum, fyri at Føroyar skulu kunna fáa sjálvstøðuga altjóða umboðan, ella skulu kunna taka aftur útdelegaraða valdið á uttanríkispolitiska økinum. Hartil kemur, at vandi er fyri, at heldur enn at økja um sjálvstýri Føroya, kann ein nýggj løgfrøðilig binding millum Føroyar og Danmark, ið ikki er grundað á altjóða rætt, bera við sær skerd tjóðarrættindi.*

*Forðingin fyri føroyskari sjálvstøðugari umboðan á altjóða leikpallinum í dag er ikki løgfrøðilig — bert politisk.*

**Danska grundlógin - ongin forðing**

Danmark fer í næstum at hava fólkaatkvøðu um at lata m.a. uttanríkismál til ES at umsita. Hetta meta danskir myndugleikar ikki verða í andsøgn við donsku grundlógina. Tá Danmark kann flyta hesar heimildir til ES at umsita, so kann danska grundlógin als ikki verða nøkur forðing fyri at flyta uttanríkispolitiskar heimildir aftur til Føroya.

Somuleiðis er ongin ivi um, at kann heimild gevast fyri, at Føroyar og Grønland kunnu umboða "Kongeriget Danmark" í altjóða høpi, so kann sanniliga eisini finnast heimild, ið tryggjar Føroyum og Grønlandi at umboða seg sjálvi í altjóða høpi — ikki minst grundað á altjóða rætt.

Talan er í størri mun um manglandi vilja — heldur enn manglandi heimild.

**Heimastýrislógin — ongin forðing**

Tá umrøður heimastýrislógina, so er talan um eina politiska avtalu, ið varð gjørd landanna millum í 1948. § 1 í heimastýrislógini staðfestir, at: "Føroyar eru sjálvstýrandi tjóð í danska ríkinum _". Harvið hava føroyingar sum tjóð — sambært altjóða rætti — rætt til at biðja um broyting av viðurskiftunum við danska statin, og m.a. taka aftur øki til Føroya at umsita, tá hetta verður ynskt. Leggjast kann afturat, at lógin er frá 1948 og er fleiri ferðir toygd. Eitt nú eru málsøki, ið ikki eru nevnd í lógini tikin heimaftur til Føroya. Er politiskur vilji til staðar, vil heimastýrislógin, sum tann politiska avtala hon er, tí ikki verða nøkur forðing fyri sjálvstøðugari føroyskari umboðan í altjóða høpi.

**Altjóða samfelagið — ongin forðing**

Føroyski atlimaskapurin í International Maritime Organization (IMO) — ið er ein altjóða felagsskapur undir ST — staðfestir óbeinleiðis at føroyingar eru tjóð, ið hevur rætt til sjálvstøðuga umboðan - eitt nú í altjóða ST-felagsskapum. Hesin atlimaskapur er bert eitt dømi av mongum um, at tað ikki er altjóða samfelagið, ið er ein forðing, tá umrøður sjálvstøðuga føroyska umboðan í altjóða felagsskapum v.m.

**Fólkarætturin — ongin forðing**

Føroya Løgting hevur staðfest, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti sambært altjóða rætti. Føroyingar uppfylla eisini allar treytir, ið settar verða, fyri at verða viðurkendar sum tjóð við sjálvsavgerðarrætti sambært altjóða fólkarættinum. Tí er tað ikki ein spurningur, hvørt føroyskir myndugleikar hava rætt at umboða Føroyar í altjóða høpi. Tað hava vit um vit ynskja hetta. Einasta forðingin er tann politiski viljin — ella mangul uppá sama.

**Manglandi politiski viljin — ein forðing**

Velja føroyingar at átaka sær økta ábyrgd og ávirkan á uttanríkispolitiska økinum eigur hetta at verða grundað á, at føroyskir myndugleikar umboða seg sjálvar, ikki "Kongeriget Danmark". . Men politiski trupulleikin er, at danskir myndugleikar vilja verða við, at Føroyar ikki kunnu umboða seg sjálvar — bert "Kongeriget Danmark for såvidt angår Færøerne". Danska stjórnin hevur ferð eftir ferð víst á, at hon metir, at danska ríkið er eitt eindarríki, har bert ein tjóð er til, og tað er tann danska tjóðin. Tí er sera hugsandi, at danska stjórnin við at fáa føroyskar myndugleikar at umboða "Kongeriget Danmark", og við at vísa til donsku grundlógina í viðmerkingunum til heimildarlógina, soleiðis roynir óbeinleiðis at fáa eina viðurkenning frá føroyingum av, at danska ríkið er ein eindarstatur.

**Danska stjórnin — ein forðing**

Ein onnur orsøk til oman fyri nevnda illgruna er, at danska stjórnin longu hevur gjørt føroyingum greitt, at øktar uttanríkispolitiskar heimildir ikki koma at merkja ávirkan á trygdarpolitikk ella á sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum og IWC. Hvat skulu Føroyar so "fáa" sum vit ikki hava í dag ?

Heimildarlógin fyri Grønland, ið skuldi til 1. viðgerð á Fólkatingi 21. jan. 2005, vísti eisini, at talan als ikki verður um øktar heimildir — bert staðfesting av nøkrum núverandi rættindum, og skerjing av fleiri øðrum rættindum.

**Veljið Føroyar !**

Heldur enn at gera nýggja løgfrøðiliga binding millum Føroyar og Danmark, ið kann hava við sær, at føroyingar óbeinleiðis viðurkenna danska eindarstatin, viðurkenna avmarkaði rættindi til at umboða okkum sjálv og seta tjóðarrættindi í vága, átti Føroya Landsstýri at farið veruliga til verka.

- Átti at fingið altjóða staðfest og viðurkent tjóðarrættindi føroyinga.
- Átti at kravt sjálvstøðuga umboðan, ábyrgd og avgerðarrætt í uttanríkis- og trygdarmálum.
- Átti at valt Føroyar fram um "Kongeriget Danmark for såvidt angår Færøerne".

Les meira á heimasíðuni: www.hafoss.com

## Gjald fyri valgreinar

**Tað er nú greitt, at fólkatingsval verður 8. februar í ár. Eins og tað hevur verið vanligt í tíðini fram til eitt val, fer Sosialurin aftur hesa ferð at taka pengar fyri valgreinar, sum verða settar í blaðið.**

**Enn er freistin fyri at lata vallistar inn ikki lokin, men frá og við Vikuskiftisblaðnum komandi fara vit at taka pening fyri greinar, sum beinleiðis eru tengdar at valstríðnum. Gjaldið fyri valgreinar er helvtin av vanligum lýsingarprísi.**

**Sosialurin**